# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Simona Nielsen 80 ár

31. desember 2005 fylti Simona Nielsen í Glostrup 80 ár. Føðingardagurin varð hildin saman við vinum og kenningum í Glostrup Frikirke. Simona, sum er ættað av Toftum, hevur búð í Keypmannahavn síðan 1947.

Hon vaks upp inni á Toftum, sum tann næst yngsta av teimum fimm døtrunum hjá Onnu Elisabeth og Magnus F. Mikkelsen. Tey handlaðu á Toftum og eftir kríggið flutti familjan til Havnar, har tey róku klædnahandilin, "Magnus F. Mikkelsen Manufaktur", sum seinni fekk navnið Skálabúðin.

Tær fimm systrarnar eru: Poulina Zachariassen, Karolina (Linnebeth) Berg, Jenny Gunnarsson (1924-1999), Simona Nielsen og Hertha Skýlindal.

Simona fekk arbeiði á telefonstøðini í Havn. Í 1947 bað hon um farloyvi í hálvt ár, tá hon saman við tveimum øðrum føroyskum gentum fór til Danmarkar at arbeiða á einum hotelli á Norðursælandi. Síðan fekk hon starv á sjúkrahúsinum St. Lucas Stiftelsen í Hellerup.

Hon fór síðan til Keypmannahavnar. Har møtti hon Arne Nielsen, sum var útbúgvin og arbeiddi sum prentari. Tey giftust í Keypmannahavn í 1949.

Í 1954 fingu tey dóttrina Annelise, og í 1958 fingu tey sonin Bent. Meðan børnini vóru smá, var Simona heimaarbeiðandi.


Mynd: Øssur Berghamar

Annelise er útbúgvin sjúkrasystir, og hevur hon tikið aðrar útbúgvingar í hesum sambandi, soleiðis at hon í dag kann undirvísa øðrum sjúkrasystrum. Hon og maðurin, Benny, eiga tvey børn: John, 27, og Miriam, 25. Bent er útbúgvin magistari í donskum og tónleiki. Í dag arbeiðir hann sum pastorur í samkomuni "Amagerbro" á Amager, samstundis sum hann eisini arbeiðir við undirvísing í teologi. Hann og konan, Lone, eiga eisini tvey børn: Mattias, 20, og Cecilie, 15.

Simona fall væl til í Keypmannahavn, og hon og maðurin komu nógv saman við føroyingum í Danmark, serliga í brøðrasamkomuni í Torsgade 40, sum seinnu flutti til Brønshøj. Tá tey seinni flutti til Glostrup, vóru tey við til at stovna samkomuna Glostrup Frikirke.

Í mong ár høvdu tey sína egnu fyritøku, prentsmiðjuna Søborg Bogtrykkeri. Har arbeiddu tey til Arne bleiv pensioneraður. Arne andaðist í 1998, 76 ára gamal.

Simona gongur høgt upp í familjuna, og hóast høga aldurin er hon framvegis virkin. Hon kemur til møtir og eldrasamkomur, sum Glostrup Frikirke og Kristnastova skipa fyri. Eisini gongur hon til fimleik tvær ferðir um vikuna.

**m.**

## Andlát og jarðarferðir

**Búgvi Christiansen**, sonur Odbjørg og Sørin í Tórshavn, andaðist í heiminum 7 jan. 21 ára gamal. Farið verður úr heiminum týskvøldið klokkan 18. í Vesturkirkjuna. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13.

Tey, sum vilja minnast Búgva, kunnu geva eina gávu til felagið Føroya Syndrom, konta í pengingastovninum.

**Maria á Lakjuni**, Fuglafirði, vanliga nevnd Mia, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 8. januar, 84 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Karl E. Andreasen**, vanliga nevndur Karl hjá Hildu, andaðist sunnudagin 8. jan. á Klaksvíkar Sjúkrahúsið, 84 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jona Mikkelsen** ættað úr Vági búðsitandi í Klaksvík, andaðist í Norðoyar røktarheimið sunnukvøldið 90 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Marjun Dalsgaard**, fødd Johannesen, ættað av Skála doyði, 7 januar í Keypmannahavn 76 ára gomul.

7. januar andaðist **Svenning Danielsen,** Kaldbak, á Lágargarði 87 ára gamal.

Farið verður av Lágargarði týsdagin 10. januar, klokkan 14.

Jarðarferðin verður úr Kalbaks kirkju mikudagin 11. januar klokkan 13.

Tey sum vilja minnast Svenning kunnu lata eina peningagávu til Kaldbaks kirkju á kontu í Føroya Sparikassa: 9181- 4951923.

**Marjetta Heinesen** andaðist á Norðoyar røktarheimið sunnudagin 8. januar 85 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Rigmor Ræ**t**tá**, Tórshavn, vanliga nevnd Rigmor hjá Guttanum, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 6. januar, 84 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Minningarorð um Lis Nolsøe



Lis Nolsøe varð fødd 28. mars 1925. Hon var dóttir Doru og Mourits Winther. Hon var yngst av sjey systkjum og var tað einasta av systkjunum, ið varð verandi eftir í Klaksvík hjá foreldrunum.

Lis giftist við Eli Nolsøe sunnan úr Vági. Tey búsettust í Víkunum oman fyri barnaheim hennara. Tey bæði fingu níggju børn.

Eli Nolsøe var skrivstovumaður, hevði eisini handil einaferð, og hann var eisini Løgtings- og Landsstýrismaður fyri Sambandsflokkin í fleiri ár.

Í heimi teirra varð tosað opið um politikk, og altíð var Lis manni sínum ein hollur stuðul. Lis var heima og tók sær av manni og børnum.

Húsið var stórt, nógv at taka hond í, men Lis var røsk, og arbeiðið fall henni lætt. Lis var ein sera fyrikomandi, blíðlig og gløgg kvinna, og hon hevði eitt lætt sinni.

Stóran áhuga hevði hon í øllum, ið hendi í samfelagnum og líka til tað seinasta, møtti hon trúføst til fundir, ið Norðoya Sambandsfelag skipaði fyri.

Lis var okkum ein góð fyrimynd og dyggur stuðul.

Tað er við størstu virðing og takksemi vit minnast Lis, sum andaðist hin 29. mei 2005, 80 ára gomul.

Ærað verið minnið um Lis Nolsøe.

**Norðoya Sambandsfelag**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum mongu, sum gleddu og ríkaðu meg á 80 ára føðingardegi mínum tann 15. desember 2005.

Hetta stóra, góða føðingardagshald hevði als ikki borið til, hevði KFUK í Havn ikki tikið so hjartaliga og stórfingið ímóti mær.

Tann 15. desember 2005 hevur fest seg í minnið í fløvandi takksemi.

**Bergtóra Jacobsen**
**Grønlandsvegur 37, Tórshavn**

### Dagurin í morgin

**10. januar. Páll einabúgvi**, deyður ár 341. Livdi eini 90 ár í egyptisku oyðimørkini og gjørdist 113 ára gamal. Sigst at hava verið fyrsti kristni einbúgvi og skírdur halgimenni. Navnið Páll er komið av latínskum *Paulus* (tann lítli)

### Silvurbrúdleyp

Mánadagin 9. januar hava hjúnini Sunnuva og Terji á Lakjuni í Fuglafirði silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

7. januar andaðist

**Svenning Danielsen**
Kaldbak

á Lágargarði, 87 ára gamal.

Farið verður av Lágargarði týsdagin 10. januar kl. 14.00.
Jarðarferðin verður úr Kaldbaks kirkju
mikudagin 11. januar kl. 13.00

*Familjunnar vegna*

**Herborg og børnini v/ familju**

*Í staðin fyri blómur ella kransar, kunnu tit lata eina peningagávu til Kaldbaks kirkju á konto í Føroya Sparikassa, 9181-495.192.3*